## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:** Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og sum frálíður regn. Út á seinnapartin minni vindur av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið hósdagin:** Fleyr til gul av útsynningi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið fríggjadagin:** Fleyr til gul av útsynningi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:** Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og leygardagin yvirhøvur turt, men sunnudagin ælingur. Hitin millum 10 og 14 stig.

# Pensionistafelagið aftur undir fundarvirksemið

**Pensionistafelagið í Havn fer aftur undir fundarvirksemið, nú summarið tekur at halla. Fundir eru hvørt mikukvøld – tann fyrsti 6. september kl 19 í Losjuni í Havn**

PENSIONISTAFELAG

Tá ið summarið tekur at halla, plagar lív aftur at koma í arbeiðið hjá teimum feløgum, sum fyri mesta partin hava sítt virki í vetrarhálvárinum.

Eitt av hesum feløgum er Pensionistafelagið í Havn. Arbeiðið er vant at byrja aftur fyrst í september og plagar at halda á til seinast í mai. Í juni, juli og august heldur felagið summarfrí.

Felagið er stovnað 20. mai 1976, og hevur soleiðis 30 ár á baki. Í hesum sambandi skipaði felagið fyri veitsluhaldi í B36 húsinum, har vit kundu gleða okkum yvir at síggja eina rættiliga stóra mongd av felagsins limum.

Sum limir kunnu øll tekna seg, sum hava fylt 60 ár. Fólk, sum fáa avlamsispensión, tá tey hava fylt 55 ár.

Felagið verður stýrt av eini 5-mannanevnd, sum vald verður á ársaðalfundi felagsins. Ársaðalfundurin verður hildin seinnapartin í oktober.

Felagið hevur fund eina ferð um vikuna, tað er hvørt mikukvøld. Vanliga byrja fundirnir kl. 19.00.

Roynt verður at hava eitt so fjølbroytt fundarvirksemi sum til ber. Vit plaga at hava fólk at halda fyrilestrar um ymisk evni. Eitt nú hava vit havt læknar at hava fyrilestrar. Tá hevur tað helst verið um sjúkufyribrygdi, sum gomul og eldri mangan eru fyri og um eyðkenni av slíkum. Slíkt hevur víst seg at hava stóran áhuga millum limirnar.

Fyrilestrar um handalig evni hava eisini verið. So eru tað ljósmyndir og filmar, sum av og á verða víst. Upplestur av ymsum slag. Ferðafrásagnir. Og so eru tað aðrar tíðir, at limirnir hugna sær hvør í sínum lagi. Teir hava hondarbeiði við. Stokkarnir ringla. Prátið gongur dúgliga. Tað eru tey, sum hava leitað sær yvir í ein krók og kortini eru komin fram. Viðhvørt ganga fleiri kort. Og onkur onnur spøl. Eisini verður sungið. Hvørt kvøld er so ein góður drekkamunnur, og tá drekkamunnurin kemur, so er tað sum Jeppe Aakjær sigur onkustaðni:

Thi får de piben tændt, de danske bønder,
Og snakken rejst om hest og ko og stud,
Vær glad, ifald du véd, hvor det begynder,
Thi hvor det ender -, nej, det véd kun Gud.

Altíð er okkurt av áhuga, sum hent er síðan seinasta fund. Dagsins evni verða viðgjørd. Onkur hevur verið ein lítlan ferðingatúr á bygd, og so hava tey tað at siga frá.

Av og á plaga vit at bjóða feløgum aðrastaðni frá at vitja, eins og vit hava verið boðin út á bygd at vitja. Okkum í okkara felag tykir, at tað er sera hugnaligt at fáa gestir og eisini tað at verða boðin at vitja onnur feløg.

Og so er tað bingo, sum verður fyrireikað eina ferð um mánaðin. Tá kunnu limirnir taka gest við.



Vert er at nevna, at alt fyrireikingararbeiðið er sjálvboðið. Tað vil so vera, at hetta at fyrireika fund hvørja viku, tað tekur eitt sindur av tíð, men verður heitt á limirnar at rætta eina hjálpandi hond, so eru teir altíð til dystin fúsir.

Felagið verður stýrt av eini 5-mannanevnd, sum vald verður á ársaðalfundi felagsins. Ársaðalfundurin verður hildin seinnapartin í oktober.

Í nevndini sita nú. Sune Joensen, (formaður), Selma Gaard, (næstformaður), Hans Samuelsen, (kassameistari), Anna Jacobsen, Torgerð Jensen.

Limir kunnu tekna seg hjá formanninum, tlf. 313409, ella kassameistaranum, 311640.

Ein og hvør, sum nátt hevur tí ásetta aldursmarkinum, er hjartaliga vælkomin sum limur.

Nú byrjar so fundarvirksemið hjá felagnum aftur mikukvøldið 6. september kl. 19.00. Hetta fyrsta kvøldið, tá vit byrjað aftur, plaga vit at hava eitt sindur av veitsludámi. Sjálvtøkuborð við breyði og ymsum viðskera. Serliga innbodnir gestir. Nærri lýsing verður í bløðunum.

Felagið hevur fundir sínar í Losjuni, Tinghúsvegur 18.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 7 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 9 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 14 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 13 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 18 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 19 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 19 |
| Helsinki | 23 |
| Moskva | 23 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 32 |
| Paris | 21 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 31 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 35 |
| Malta | 35 |
| Tunis | 33 |
| Beijing | 30 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | 17 |
| New York | 31 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 9 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt hátrýst, 1019 hPa. í landnyrðing úr Føroyum viknar. Eitt lágtrýst, 1001 hPa. sunnan fyri Ísland fer eystureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikudagin.




**Í dag:**
Lágtrýstið við Føroyar fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið við Føroyar fer eystureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 20/8 kl. 06[00]– 21/8. 06[00]. Hitin í gjár: 12,3°
Minsti hiti máldur í august: 0,2° - Mesti hiti máldur í august: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 20/8 kl. 06[00]– 21/8 kl. 06[00]
Avfallið higartil í august: 34,4 mm

Brúðarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast
www.brudarlin.com

www.sosialurin.fo




## VESTFALLSKYRRINDI

26. august Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. Aug | 06.35 | 18.58 | 05.35 | 17.58 | 05.50 | 18.13 | 08.35 | 20.58 | 09.35 | 21.58 | 04.50 | 17.13 | 03.50 | 16.13 | 06.50 | 19.13 | 07.50 | 20.13 | 06.20 | 18.43 | 07.35 | 19.58 |
| 23. Aug | 07.18 | 19.39 | 06.18 | 18.39 | 06.33 | 18.54 | 09.18 | 21.39 | 10.18 | 22.39 | 05.33 | 17.54 | 04.33 | 16.54 | 07.33 | 19.54 | 08.33 | 20.54 | 07.03 | 19.24 | 08.18 | 20.39 |
| 24. Aug | 07.59 | 20.20 | 06.59 | 19.20 | 07.14 | 19.35 | 09.59 | 22.20 | 10.59 | 23.20 | 06.14 | 18.35 | 05.14 | 17.35 | 08.14 | 20.35 | 09.14 | 21.35 | 07.44 | 20.05 | 08.59 | 21.20 |
| 25. Aug | 08.40 | 21.00 | 07.40 | 20.00 | 07.55 | 20.15 | 10.40 | 23.00 | 11.40 | - | 06.55 | 19.15 | 05.55 | 18.15 | 08.55 | 21.15 | 09.55 | 22.15 | 08.25 | 20.45 | 09.40 | 22.00 |
| 26. Aug | 09.18 | 21.36 | 08.18 | 20.36 | 08.33 | 20.51 | 11.18 | 23.36 | 00.00 | 12.18 | 07.33 | 19.51 | 06.33 | 18.51 | 09.33 | 21.51 | 10.33 | 22.51 | 09.03 | 21.21 | 10.18 | 22.36 |

5 707265 100036 >